Sunnleif Højgaard, Føroya Postfelag:

# - Málið má viðgerðast av nýggjum

**Formaðurin í Føroya Postfelag, Sunnleif Højgaard, sigur, at felagið ikki enn hevur tikið støðu til, um tað framhaldandi skal stuðla einum arbeiðssteðgi komandi fríggjadag**



*Formaðurin í Føroya Postfelag, Sunnleif Højgaard, sigur, at felagið noyðist at viðgerða støðuna viðvíkjandi fráboðaða arbeiðssteðginum komandi fríggjadag av nýggjum, eftir at forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar breyt avtaluna, sum tey 25 feløgini høvdu gjørt, í útvarpinum mikudagin.*

*savnsmynd*

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hjá formanninum í postfelagnum kom tað eisini dátt við, at forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar íútvarpinum mikudagin breyt avtaluna, sum tey 25 fakfeløgini høvdu í sambandi við arbeiðssteðgin.

### Viðgerast hósdagin

Tá ið vit fingu orðið á Sunnleif Højgaard hósmorgunin, segði hann, at Føroya Postfelag enn ikki hevði broytt støðu til arbeiðssteðgin, og tí framhaldandi stuðlaði tiltakinum.

- Umstøðurnar eru tó broyttar, og vit fara at viðgerða málið seinni í dag. Vit mettu, at øll feløgini vóru samd um, at vit vóru saman um hetta, sigur Sunnleif Højgaard.

Nú umstøðurnar eru broyttar, av tí at Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar breyt avtaluna, er neyðugt hjá nevndini í Føroya Postfelag at viðgerða málið av nýggjum, og tað var so gjørt á fundi hósdagin eftir evstamark hjá blaðnum.

Magnus Tausen, Føroya Lærarafelag:

# - Ógvuliga óheppið

**Nýggi formaðurin í einum tí størsta fakfelagnum í landinum, Føroya Lærarafelag, Magnus Tausen, metir tað verða sera óheppið, at Jana H. Dalsgaard breyt avtaluna, sum tey 25 fakfeløgini høvdu gjørt í sambandi við fráboðaða arbeiðssteðgin um eina viku**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Eisini Føroya Lærarafelag fer at viðgerða støðu felagsins til fráboðaða arbeiðssteðgin komandi fríggjadagin, eftir at Jana Dalsgaard, forkvinnan í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ikki helt seg til avtaluna, sum tey 25 fakfeløgini høvdu gjørt, tá ið hon í útvarpinum mikudagin blandaði ta ítøkiligu ósemjuna á Føðideildina upp í trætuna um, at fútarætturin verður brúktur í arbeiðsmarknaðartrætum.

### Fyribils sama støða

Formaðurin í Lærarafelagnum, Magnus Tausen, sigur, at fyribils hevur felagið ikki broytt støðu í málinum, men nevndin í Føroya Lærarafelag kemur saman í dag, har hon fer at viðgerða málið av nýggjum.

- Tað er ógvulga óheppið, at forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar breyt avtaluna í fimmaranum, tí hetta broytir støðuna. Vit høvdu eina heilt greiða avtalu um, at ítøkiliga ósemjan á føðideildini ikki skuldi blandast upp í málið um fútarættin, sigur Magnus Tausen.

Nevndarfundurin í lærarafelagnum verður í morgun, og hóast Magnus Tausen ikki vil koma við nakrari útmelding um, hvørja støðu felagið fer at hava eftir fundin, so skilst á øllum brøgdum, at hann er ógvuliga misnøgdur við forkvinnuna í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

# Seinasta skotið verður helst kongaligt



*Mary, krúnprinsessa, spøkir í kulissuni, tá ið gitt verður um, hvør ið skal lata seinasta skotið í Norðoyatunnlinum av. Væntandi verður seinasta skotið samstundis sum danska kongshúsið vitjar her á landi.*

*Myndaviðgerð: Bárður Lydersen*

**Hóast tíðindini ikki eru váttað, so bendir alt á, at tað verður ein limur í danska kongshúsinum, ið fer at skjóta seinasta skotið íNorðoyatunnlinum.**

NORÐOYATUNNILIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Alt bendir á, at tá ið Norðoyatunnilin verður skotin endaliga ígjøgnum, verður tað ein limur úr danska kongshúsinum, ið fer at skjóta seinasta skotið av. Vælvitandi keldur, sum Sosialurin hevur tosað við, vátta, at ætlanir eru um hetta.

### Tíðarætlanin passar

Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunnilinum, vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini. Hann sigur, at dagurin, tá ið seinasta skotið skal latast av, er ikki ásettur enn, og fyrr enn tað er greitt, ber ikki til at fyrireika dagin nágreiniliga.

- Vit fyrireika dagin í ein ávísan mun, og sambært tíðarætlanini verður tað helst einaferð í seinnu helvt av juni mánað, at seinasta skotið verður latið av, sigur Dávur Reinert Hansen. Tað er júst í seinnu hálvu av juni mánað, at Margrethe drotning, Henrik prinsur, og krúnprinsaparið Frederik og Mary vitja í Føroyum, so tíðarætlanin tykist passa ógvuliga væl.

Nevndarformaðurin í Norðoyatunnlinum, Bergur í Garði, sigur, at hann hevur eisini frætt, at tað verður onkur kongaligur, ið skal lata seinasta skotið av, men enn hevur nevndin einki frætt um hetta. Bergur í Garði heldur tó, at tað hevði verið ógvuliga hóskandi, um tað var onkur limur í kongafamiljuni, ið skeyt seinasta skotið.

### Ríkisumboðið hevur umrøtt málið

Á skrivstovuni hjá Ríkisumboðnum arbeiða tey við at leggja skránna fyri kongaligu donsku vitjanina. Marian Khalil, ið hevur málið um hendi, sigur, at í verandi løtu er seinasta skotið í Norðoyatunnlinum ikki ein partur av skránni, men málið hevur verið umrøtt.

- Trupulleikin er tann, at dagurin fyri seinasta skotið er ikki ásettur enn, og ikki fyrr enn tá kann støða takast til, um tað ber til hjá umboðum fyri kongshúsið at verða við til at lata seinasta skotið av. Eg kann tó vátta, at tað hevur verið viðgjørt, men tað eru nógv ting, ið skulu upp á pláss, áðrenn tað gerst veruleiki, sigur Marian Khalil.